

gerast limir. Londini á Balkan kunnu møguliga gerast limir í framtíðini. Slovenia er limur sum er, meðan Kroatia, Bosnia, Makedonia, Serbia og Albania framvegis hava langt á leið. Lond sum Ukraina og Moldova kunnu kanska um nøkur ár koma upp á tal, men tað liggur langt frammi í tíðini.

Tað eru ikki bara lond á evropeiska landakortinum, ið hava sýnt áhuga fyri at gerast limir í ES. Norðurafrikanska landið Marokko sendi í 1987 eina umsókn um ES-limaskap, men hon bleiv havnað á staðnum.

– Norðurafrika er landafrøðiliga uttanfyri Europa, og tí kann tað ikki koma upp á tal, at tjóðir sum Tunis, Marokko ella Egyptaland nakrantíð gerast limir, slær Niels Helveg Petersen fast.

**Sorgarleikurin á Balkan**

Tað vóru kortini ikki bara sólskinssøgur sum víðkanin av NATO og ES, sum fyltu uttanríkispolitiska pallin í nítiárunum. Kríggið í fyrrverandi Jugoslavia er ein sorgarsøga av teimum heilt stóru, og Niels Helveg Petersen sat á fremstu parkett hesi árini bæði í NATO og ES.

Fyrrverandi forsetin í Jugoslavia, Slobodan Milosevic, slapp leingi at hóreiggja sum honum lysti, áðrenn nakrir altjóða myndugleikar traðkaðu inn. Tað kennist eisini týðuliga á fyrrverandi uttanríkisráðharranum, at trupulleikin í Jugoslavia ikki varð loystur optimalt.

– Vit vórðu øll tikin á bóli av, hvussu leikur fór fram. Frá seinna heimsbardaga til Berlin múrurin fall gekk stillisliga fyri seg í Jugoslavia, men so gekk heilt galið. Grannar fóru at drepa frá hond, og tað var lítið hugaligt at síggja og lesa um hópdrápini í Srebrenica og etnisku útreinsingina í Kosovo, fortelur hann.

Niels Helveg Petersen hevði sæti í NATO, tá Slobodan Milosevic ótarnaður slapp at drepa frá hond í Srebrenica og Kosovo, og fyrrverandi uttanríkisráðharrin ásannar eisini í dag, at NATO vóru ov seinir á sjóvarfallinum og áttu at farið inn í kríggið áðrenn.

–Tað er altíð lætt at vera bakklókur, men stríðið á Balkan vísti einaferð fyri allar, at NATO er besta amboðið at nýta í slíkum stríðum. ST royndi í fyrstu atløgu at sissa partarnar, men tað var ikki fyrr enn NATO traðkaði til, at tað veruliga hendi nakað, fortelur hann.

Stóri bøðilin í fyrrverandi Jugoslavia, Slobodan Milosevic, doyði herfyri í sínum fangabúrið í Haag. Sum uttanríkisráðharri hitti Niels Helveg Petersen fleiri ferðir hópdrápsmannin úr Serbia. Hann hevur lítið gott at bera honum.

– Eftirmælið hjá Slobodan Milosevic verður alt annað enn gott. Hann vil verða mintur, sum tann, ið gekk á odda fyri hópdrápunum í Srebrenica og etnisku utreinsingunum í Kosovo. Hann gjørdi sínum landi stóran skaða. Orsakað av honum liva serbar í dag í svárari armóð, sigur Niels Helveg Petersen.

> *Eftirmælið hjá Slobodan Milosevic verður alt annað enn gott. Hann vil verða mintur, sum tann, ið gekk á odda fyri hópdrápunum í Srebrenica og etnisku utreinsingunum í Kosovo. Hann gjørdi sínum landi stóran skaða. Orsaka av honum liva serbar í dag í svárari armóð*

Universitet – **Karriera:** Valdur í Fólkatingið í 1966. Politiskur orðførari 1968-74. Eitt skifti formaður í Radikala Vinstra. Búskaparráðharri 1988-90. Uttanríkisráðharri 1993-2000.